# Sjónvarpið roynast í Fjølmiðlanevndini

JÁKUP EGHOLM HANSEN
Tekniskur stjóri hjá Tórshavnar Kommunu

Høvuðskærumál: Sjónvarpið, og herundir Anniku Bolton Mortensen, Georg L. Petersen, redaktørur og Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í Sjónvarpinum skulu roynast fyri vreingjan av upplýsingum, fyri lygnir, at burturtiga upplýsingar.

**Skaðiligar ákærur**
Í Degi og Viku fríggjadagin í seinastu viku var tekniski stjórin hjá Tórshavnar kommunu og onnur í familju hansara meira ella minni beinleiðis løgd undir korruptión av Sjónvarpinum. Hetta førdi til, at borgarstjórin bað um eina óhefta advokatkanning av málinum, fyri m. a. at staðfesta um nakað óregluligt var farið fram.

**Tekniski stjórin reinsaður**
Advokatkanningin hevur nú staðfest, at hvørki tekniski stjórin, restin av teknisku umsitingini ella borgarstjórin hava framt nakað brot á §3 í fyrisitingarlógini.

**Sjónvarpið verður nú kært**
Grovu skuldsetingarnar hjá Sjónvarpinum móti tekniska stjóranum í Tórshavnar kommunu, og mistonkiliggeringin av øðrum í familju hansara, reisa spurningin um Sjónvarpið er farið útum mark, og hevur brotið góðan fjølmiðlasið. Vit hava tíbetur fingið eina fjølmiðlaábyrgdarlóg nú, soleiðis at vanlig fólk hava fingið eitt amboð at verja seg móti slíkum ágangið sum hesum frá Sjónvarpinum. Og hetta málið er so álvarssamt, at tað einasta rætta er at royna málið í Fjølmiðlanevndini, sigur Jákup Egholm Hansen. Og nú óhefta advokatkanningin er komin til eina greiða niðurstøðu, hevur tekniski stjórin hjá Tórshavnar kommunu avgjørt at kæra málið. Í fyrstu atløgu verður kært til Kringsvarpsleiðsluna. Um ikki ein fult út nøktandi umbering og rættleiðing verður givin í seinasta lagið komandi mánadag, verður farið til Fjølmiðlanevndina, sigur Jákup Egholm Hansen.

**Skeivur og misvísandi tíðindaflutningur**
"Sjónvarpið hevur hóast betri vitan, borið fram tíðindi, ið eru full av feilum, sum eru snaraði og sum innihalda beinleiðis lygnir. Teir hava skatt umdømi hjá mær og familju míni. Væntandi farið eg eisini at stevna Sjónvarpinum eftir endurgjaldi fyri skaða á mítt umdømi og fyri at hava skatt framtíðar virkismøguleikar hjá bæði mær og familju míni"

**Sjónvarpið ikki hildið góðan fjølmiðlasið**
Lógin um fjølmiðlaábyrgd áleggur fjølmiðlum at vísa góðan fjølmiðlasið. Góður fjølmiðlasiður er m.a., at tá talan er um serliga skaðandi upplýsingar, áliggur fjølmiðlunum ein serlig skylda at kanna øll viðurskifti til botns frammanundan. Harumframt er tað ikki góður fjølmiðlasiður at hongja óviðkomandi persónar við navni út. Og sjálvandi er tað eisini umráðandi, at fjølmiðlarnir tosa satt, og lýsa allar vinklar í málinum. Sjónvarp Føroya hevur ikki hildið seg til nakra av hesum meginreglum.

Tað vísir seg nevnliga, at teir hava ikki tosa við fleiri av nevndu persónunum í innslagnum í Degi og Viku. Eisini hevur Sjónvarpið borið fram skeivar upplýsingar um konu tekniska stjórans, og hevur nevnt navnið á konu hansara við navni í hesum sambandi, hóast at tíðindavirðið í hennara navnið er óviðkomandi. At hon er eitt kent navn er ongin umbering fyri slíkari framferð hjá Sjónvarpinum.

Samstundis eru samrøður, ið tíðindakvinnan Annika Bolton Mortensen hevði við tekniska stjóran og leiðaran fyri Húsaumsitingina hjá kommununi tagdar burtur. Í hesum samrøðum váttaðu hesir, at tekniski stjórin beinanvegin tók avgerð um at hann var inhabilur, og tók seg burtur úr øllum sum hevði við samskifti við allar byggifyritøkurnar sum arbeiða í Realskúlanum at gera. Í staðin var í Degi og Viku sagt, at tekniski stjórin hevði ongar viðmerkingar. Eitt notat í málinum vísir, at hetta er ikki satt, og at tað vóru fleiri vitni til tað. Tekniski stjórin vildi bert ikki gera myndaupptøkur.

**Sjónvarpið snarar fakta**
Eisini kann staðfestast, at Sjónvarpið hevur snarað fakta í málinum. Víst varð til eitt tekniskt notat um bruna- og trygdarviðurskifti í Gamla Realskúlanum, sum tekniski stjórin hevði gjørt eftir áheitan frá borgarstjóranum, sum var sagt verða prógv um, at tekniski stjórin hevði ikki hildið seg vekk frá umvælingararbeiðinum. Notatið hevur tó onki við sjálvt arbeiði hjá byggifyritøkuni Viking Smíð at gera. At Sjónvarpið er fullkomiliga á skeivari leið verður prógvað á teirra egnu heimasíðu, har teir eftir sendingina í Degi og Viku skriva, at tekniski stjórin hevði fyrireikað alt málið og notatið áðrenn Viking Smíð fekk arbeiðið. Hetta er eisini lygn. Notatið er gjørt tríggjar mánaðir aftan á at skúlin varð stongdur, og umvælingararbeiði byrjaði.

**Sjónvarpið totalt blottað fyri sjálvkritikk**
Eftir at hava umrøtt málið við fólk við serkunnleika á fjølmiðlaøkinum, leggur tekniski stjórin hjá Tórshavnar kommunu ikki fingrarnar ímillum í síni meting av trúvirðinum hjá Sjónvarpinum. "Sjónvarpið er kritiskt, men totalt blottað fyri sjálvkritikk. Hetta er sera óproffessionelt journalistiskt og redaktionelt arbeiði" sigur Jákup Egholm Hansen. "Málið er so álvarsligt fyri trúvirði hjá Sjónvarpinum, at leiðslan í Kringvarpinum neyvan gera annað enn at taka avleiðingarnar av hesum máli og seta eina kanning av handfaringini hjá Anniku Bolton Mortensen, Georg L. Petersen, redaktøri og Øssur Winthereig, tíðindaleiðara í Sjónvarpinum í gongd beinanvegin. Tíðin er búgvin til sjálvrannsakan í Sjónvarpinum, og tíðin er eisini komin til at Fjølmiðlanevndin leggur eina linju nú" sigur Jákup Egholm Hansen at enda.

# Hevði tað ikki verið fyri Paris Hiton høvdu uppaftur fleiri »sæð ljósið«

AGGA NICLASEN
meining@meyl.fo



**Grundin til, at Hilton føldi, at hon var í einum búri, var kanska hon, at hon var í einum**

So, hví í Guds garði havi eg sett mær fyri at skriva um ein forkelaðan unga av eini gentuveru, Paris Hilton at navni? Jú, tí um yvirhøvur nakað sum helst gagnligt nakrantíð skal koma frá nanvframu frøkun Hilton, so er tað nú!

Ein útsøgn frá hesari milliónínga-gellu um hvussu hon, aftaná eina óhøgliga fangasetu, hevur "sæð ljósið", má nevniliga fáa fólk á gáttini at verða "frelst" at hugsa: "Pínadoy, nei, eg meini, ádú, ádú, eg ætli mær so ikki at blíva frelstur, um handa har eisini er tað."

Aftaná eina skammiliga yrkisleið innan... ja, tað er so tað, innan presiss hvat, men ókey, innan ella í almenna rúminum, har hon hevur blaktrað sítt kynslív á alnótini, verið í einum 'reality show' í sjónvarpinum, roynt og dumpað í royndini at gerast sangari, og farið til eina endaleysa røð av paparatsiproppaðum Hollywood ballum, kunngjørdi Paris Hilton hin 11. juni, at hon hevði funnið Gud við tí seinnameiri úrsliti, at hon nú var "a different person".

Hesin 26 ára gamli kvinnuligi arvingurin, sum næstan megnaði at vríggja seg sjálva út úr eini 45-daga fongsulsrevsing, men sum nú situr so væl og virðiliga handan rimaverkið, rakti ein týðiligani iðranarfullan nóta í hennara fyrstu samrøðu sum fangi í einum borgarafongsli í Los Angeles við roynda eygleiðaran Barbara Walters, hvørs sergrein er "tey kendu".

"I'm not the same person I was," segði hon í hesi samrøðu, goldin av móttakaranum; ein uppringing upprunaliga ætlað mammuni, men sum av tilvild tosaði við Walters á eini aðrari linju. "I used to act dumb. It was an act..."—ja, góða...

"I know now that I can make a difference, that I have the power to do that. I have been thinking that I want to do different things when I am out of here. I have become much more spiritual. God has given me this new chance."

Tað, sum hon sjálvandi ikki fær at vita, og tessvegna aldri verður varug við er, at tóað alvaldandi Gud gjørdi av at, um eg so má siga, sigla við øllum seglum í frammanundan vónleysu royndini at fáa bert eithvørt hissini samband við Parisdidduna, hevði sjálvt tað ikki eydnast. Av hesi grund aleina kann tað ikki annað enn vekja undran, at hon kláraði nakað, sjálvur Gudmaðurin ikki kláraði. Og ikki bert tað, men harafturat "síggja ljósið"—sum, uttan at kenna til hatta anti-individualistiska fyribrigdið, má vera eitt samband uttan sammeting.

Ná, men henda umvendingin er eftir øllum at døma hend við 280 kilometra ferð. So seint sum hin 8. juni, altso 3 dagar fyri sína merkisverdu endurloysn, ýldi hon í rættarsalinum og rópti eftir mammuni, sum dómarin kollsigldi hasa grimmu avgerðina hjá lokala sjeriffinum at loyva frøkun Hilton at sita av revsingina heima hjá sær sjálvum og gav boð um at senda hana aftur til hennara hálvan triðja metur langa og hálvan fjórða metur breiða kliva. "It's not fair", mjarraði hon.

Men nú, sigur hon, hevur hennara andaligi ráðgevi—eitt samheiti fyri sakførari, hugsi eg—fingið hana at síggja málið, hesa roynslu, hesa royndarstund, í øðrum ljósi... einum karmiskum einum, ikki tær at siga. (Tú veitst, indisk pátrúgv um hvussu tær óndu og tær góðu gerðirnar tilsamans gera av, hvørja lagnu einstaklingurin fær í sínum komandi lívi). "My spirit or soul did not like the way I was being seen and that is why I was sent to jail. God has released me."

Kortini, hatta var so ikki frágreiðingin, dómari Sauer og almenna ákæruvaldið góvu: tey vildu sagt, at hon varð sett í fongsul av tí at hon legði ein lort í treytirnar fyri eini sakfelling um rúsdrekkakoyring umframt at hava verið fangað tríggjar ferðir aftanfyri bilstýrið við einum ógildigum koyrikorti.

Aftaná sakfellingina fyri knøppum mánaði síðan, var Hilton fyri eini makligari viðgerð frá lokala sjeriffinum—sum, og nakað, ið er komið fram seinni, fekk eitt fitt íkast til átakið at verða umvaldur frá abba Paris í fjør. Fyrst fekk handa tá ikki-frelsta gellan at vita, at hon bert skuldi sita í 23 dagar, hóast revsingin ljóðaði á 45 dagar... men, altso—sjálvandi—treytað av, at hon skikkaði sær væl. (Og sjálvandi fór Paris hjá mammu og babba, og abba, at skikka sær væl!)

Men hvat, valla tríggjar dagar aftaná at hon skrivaði seg inn í geglið, og tað hevur so verið hin 3. juni, varð hon send heim til síni nærmastu, sínar kokkteylar og kjólar, at sita av revsingina. Orsøk: ógreinandi sjúka.

Hetta var tó ikki nakað, ræthugsandi fólk vildu finna seg í. Øsingarrópini elvdu til eina skundiga rættarviðgerð og eina aftursending til fongsulsbúrið.

Walters-kvinnan spurdi til hvat slag av sjúku talan var um. Hilton svaraði: "I was not eating or sleeping. I was severely depressed and felt as if I was in a cage. I was not myself. It was a horrible experience."

Grundin til, at Hilton føldi, at hon var í einum búri, var kanska hon, at hon var í einum; lokað inni í einum holi 23 tímar um dagin, írestandi tímin ætlaður at lyfta vektir. Men, sum sagt, bert kanska.

Nú, tó, tykist Paris endaliga at hava fingið tamarhald á síni tilgjørdu sjúku. Hon hevur ikki longur í ætlu at skjóta revsingina inn fyri hægri rætt. Afturat hesum sigur hon, at tá ið hon kemur út úr myrkaholu, kundi hon hugsað sær at hjálpt kvinnum við bróstkrabba og dissemineraðari sklerosu.

Eg loyvi mær tó at ivast í, um hennara gamli ballingarriðil uttan nakað sum helst hóvasták fer at góðtaka hesa snarligu umvending.

Ná, minni um Paris, meira um meg. Hevði eg á sinni verið so áleypandi andbráður og tá, fyri Gud og hvørjum manni—og uttan at skammast—kunngjørt, at eg eri "frelstur" (t.e. at tú trýrt meira enn hin ikki-frelsti), hevði eg gjørt skjótt av og umvent meg aftur. Skilvísa hugsingin er henda: um tað nakrantíð var ein av sonnum heimilað orsøk at lata seg, ja, de-frelsa, SO ER TAÐ NÚ.

Alternativið er, at tú hvønn dag stendur andlit til andlits við teg sjálvan og kuldaskjálvtandi sannar, at tú faktiskt ert havnaður í effinett sama bási sum "eg havi eisini sæð ljósið"-Paris Hilton: ein forkelaður lortungi, óblandað ríkmannahora—og tað bókstavliga meint—blást hvat vitsevni viðvíkur, og kenslum, og yvirhøvur kend fyri apsalutt EINKI.

Nakað tað sama sum í Føroyum, faktiskt; her skalt tú bara, umframt alt hitt, vera ítróttaríðkari ella say-so tónleikari, ella bara siga, at tú styðjar 266b og Amnesty.

Og nú, at enda, bert um meg. Tí tá vit kortini endaðu her heima, so vildi verið reiðiligt av mær at upplýst, at frelstu Carlsen systrarnar er grundin til at eg, til dømis, ikki vil "síggja ljósið"; samtíðis sum at 200 er grundin til, at eg umhugsi at síggja tað... ljósið, altso.